## Samherji við nýggjum sølufelag

Oslo: Íslendska fiskivinnusamtakið »Samherji« hevur lagt alt sølulið sítt inn í eitt nýtt felag, sum kallast »Ice Fresh Seafood«. Sambært blaðnum Fiskaren byrjaði felagið virksemið sítt 1. juli og hevur í starvi tey, sum áður hava arbeitt í søludeildini í Samherja. Ætlanin er at tey skulu selja framleiðslurnar hjá Samherja og dótturfeløgunum.



## Nýggjur vegur gjøgnum Sandarlíð

Sandoy: Í løtuni kanna tey hjá Landsverki, hvat besta uppskotið er fyri tí nýggja vegnum gjøgnum Sandarlíð. Tvey uppskot liggja á borðinum, sum bæði hava til endamáls at avloysa henda gamla vegin, sum man teljast millum elstu vegastrekki í landinum. Hann er tí ikki tíðarhóskandi longur til ta ferðsluna, sum koyrir eftir honum hvønn einasta dag. Tí verður kannað hvat rættast er at gera, - breiða vegin ella møguliga bora ein tunnil. Av Landsverki verður upplýst, at prosjekteringskost naðurin fyri 2007 er 300.000 kr. Kostnaðurin fyri sjálvt arbeiðið er rættiliga ymiskur – úr 21,5 heilt upp í slakar 36 mió krónur.

# Mjólkin tolir ikki góða veðrið

**Fleiri fólk hava gjørt vart við, at mjólk og rómi tey hava keypt um vikuskiftið, spiltist fleiri dagar áðrenn lokadagin, ið stóð á pakkunum. – Tað kann vera heita veðrið, sigur MBM**

MJÓLK
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Rómin á eini lagkøku gjørdist bláur eftir at hava staðið í køliskápi í tveir dagar*

Fólk úr bæði Eysturoynni og úr høvuðsstaðnum hava um dagarnar ringt til Sosialin og sagt, at mjólkin ella rómin tey keyptu um vikuskiftið, spiltist tveir til tríggjar dagar á lokadagin, ið stóð á pakkanum. Eftir at hava staðið nakrar heilt fáar tímar á borðinum klumpaðist mjólkin, og rómin gjørdist illlittur og súrur, eftir at hava staðið tveir dagar í køliskápinum.

Á Meginfelag Búnaðarmanna, MBM, kenna tey ikki til trupulleikan.

– Vit hava fingið tvær fráboðanir frá fólki, um at okkurt hevur verið galið við vøruni, tey hava fingið, og tað er einki óvanligt, greiðir stjórin í MBM, Eirikur Thorvaldsson, frá. Hann sigur, at tað heldur ikki á laboratoriinum er nakað úrslit, sum peikar skeiva vegin, men at nú eru nýggjar kanningar settar í verk.

### Ansi eftir kølingini

Eirikur Thorvaldsson vísir á, at tað í hesum førinum illa fær verið galið við framleiðsluni.

– Vit sendu 60.000 litrar av mjólk út um vikuskiftið. Henda verður framleidd í trimum ymsum tangum á 20.000 litrar hvør, og hevði tað verið galið í onkrum av hesum, so hevði tað verið galið við 20.000 litrum, og vit høvdu verið niðurringd, sigur Eirikur Thorvaldsson.

Men hvat fær tað so verið? Møguliga hevur kølingin svikið onkustaðni, sigur stjórin í MBM.

– Hetta er árstíðin við hesum trupulleikunum. Tað er heitt í veðrinum, og um vikuskiftið var heilt upp í 17 stig. Ikki allir handlar taka mjólkina inn beinanvegin sum hon kemur, og mjólkin tolir illa slíkan hita.

– Tá so mjólkin er keypt, so verður hon ofta borin út í bilin, sum eisini er heitur tí sólin hevur skinið, og tað er heldur ikki gott fyri mjólkina, greiðir Eirikur Thorvaldsson frá.

Tí heitir hann á handlarnar, um at fáa mjólkina inn og á køl beinanvegin hon kemur til teirra. Somuleiðis eiga fólk at fáa mjólkina í køliskápi so skjótt tey eru komin heim.

### Øðrvísi smakkur nú

Eirikur Thorvaldsson hevur eisini eina frágreiðing uppá, hví mjólkin er farin at smakka eitt sindur øðrvísi nú enn hon hevur gjørt í vetur.

– Tað eru ikki øll, sum hava lagt merki til, at smakkurin er vorðin eitt lítið sindur øðrvísi. Men frágreiðingin er altso, at bøndurnir hava lovað neytunum út, eftir at tey hava staðið inni allan veturin. Har hava tey bara etið súrhoyggj, men nú skulu tey brádliga bara eta fekst gras, og tað ávirkar smakkin á mjólkini, sigur Eirikur Thorvaldsson, stjóri á MBM.

# Havgrímur keypt matin í SMS

**Havgrím Johannesen hevur keypt helvtina av øllum matstovuvirkseminum í SMS**

HANDIL
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Dvøljan eitur nýggja partafelagið, sum eigur alt matstovuvirksemi í SMS í Havn. Hetta fevnir um matstovurnar Burger King, Sun-Set og Perluna, umframt nýggju café'ina Baresso, og eru tað Havgrímur Johannesen og SMS, sum eiga hvør sína helvt í felagnum.

Havgrímur sjálvur er stjóri í Dvøljan, meðan stjórin í SMS, Niels Mortensen, er nevndarformaður. Dan Olsen, Havgrímur Johannesen og Kára Gunna Óladóttir eru nevndarlimir í partafelagnum, sum hevur eina partapening upp á fýra milliónir krónur.

– Vit hildu hetta vera áhugavert, og valdu at sláa okkum saman í eitt felag, har vit ætla at dríva á, sigur Havgrímur Johannesen. Hann ynskir ikki at siga nakað um keypsprís, men sigur bara, at báðir partar eru nøgdir við prísin.

Í endamálsorðingini hjá partafelagnum Dvøljan stendur, at: »endamál felagsins er at reka matstovuvirksemi, keyp og sølu og annað starv í hesum sambandi.«

Havgrímur Johannesen er tó fáorðaður, tá vit spyrja hann um hann ætlanin er at víðka um matstovuvirksemi og fara út um SMS við hesum.

– Eingin veit, er stutta svar hansara.



*Havgrímur Johannesen er stjóri í partafelagnum*
*savnsmynd*

## Café Natúr selt

**Bárður Højgaard, Eyðun Simonsen og Hans Jørgen Djurhuus hava keypt Café Natúr burturúr samtakinum Byin.fo**

SØLA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Rúni Djurhuus, stjóri í Byin.fo, váttar, at Café Natúr er selt burturúr samtakinum Byin.fo, sum fevnir um fimm ymisk skeinki- og dansistøð í høvuðsstaðnum: REX, Eclipse, Café Natúr, Cippo og Manhattan.

– Tað kom eitt so gott tilboð, at vit ikki fingu sagt nei, sigur Rúni Djurhuus.

Teir sum hava keypt Café Natúr úr Byin.fo, eru tríggir av fyrrverandi eigarunum í Byin.fo: Bárður Højgaard, Eyðun Simonsen og Hans Jørgen Djurhuus. Tað vil siga, at tað nú bara eru Rúni Djurhuus, Janus Einar Sørensen og Hálvdan Haldórsen sum eiga Byin.fo. Við øðrum orðum líkjast eigaraviðurskiftini nú uppruna eigaraviðurskiftunum, tá Hálvan Haldórsen og Rúni Djurhuus keyptu náttarlívið í høvuðsstaðnum av fyrstan tíð.

– Møguliga var hetta ov nógv til og fáar menn, sigur Rúni Djurhuus, sum uttan at fara í smálutir leggur aftrat, at Byin.fo í næstum ætlar at víðka um virksemi í náttarlívinum.